## Trukkar kannast

Arbeiðseftirlitið fer nú at kanna allar teir umleið 1.000 trukkarnar í Føroyum fyri at tryggja sær, at teir eru í lagi. Sambært lógini skal eftirlitið kanna allar trukkar eina ferð um árið, men tað hevur eftirlitið als ikki havt orku til, sigur Mikkjal N. J. Olsen, eftirlitsmaður, við Útvarpið. Ein trupulleiki er eisini, at trukkarnmir eru ikki skrásettir, og tí noyðist Arbeiðseftirlitið út at leita eftir teimum. Níggju virkir í Føroyum eru góðkend til at kanna trukkar.

## Stilla Kleist upp

Formaðurin í grønlendska flokkinum IA, Josef Motzfeldt, hevur boðað frá, at hann leggur frá sær, tá flokkurin fer at halda landsfund 1. juni, og nógv bendir á, at landstings- og fólkatingsmaður floksins, Kupik Kleist, fer at taka við, sigur útvarpið í Nuuk. Tann 65 ára gamli Josef Motzfeldt hevur verið formaður í IA síðani 1994. Tann 49 ára gamli Kupik Kleist er í løtuni næstformaður, og nevndin mælir til at velja hann til formann.



*Fáur veit um, at føroyingar í fleiri ár hava átt tangaskipið Tóru, sum serliga hevur siglt við matolju. Nú er skipið selt til Nigeriu*

*Mynd: Skipalistin*

# Hans Pauli selt Tóru til Nigeria

**- Vit hava selt skipið, tí nýggj IMO-krøv siga, at skip, sum sigla við matolju, skulu hava dupultan skrokk, sigur Hans Pauli í Horn, sum hevur verið skipari á føroyska tangaskipinum Tóru í nógv ár**

SKIPASØLA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Tóra hevur verið føroyskt tangaskip, sum serliga hevur siglt við matolju í Norðurevropu.

Lítið hevur verið at hoyrt um hetta skip, sum Sp/f Tóra í Horni í Sandavági er eigari av.

Tóra er kona Hans Paula, sum hevur verið maðurin aftanfyri skipið. Hann hevur eisini ført skipið flestu av árunum síðan 1988.

### Manningin uppsøgd

Nú Tóra er seld til Nigeria, hevur verið neyðugt at siga manningina úr starvi.

Átta mans hava verið við skipinum í senn, og soleiðis hava einir 16 mans verið knýttir at Tóru.

Um veturin hava teir verið tveir mánaðir umborð og tveir í landi, og um summarið hevur skiftið verið tríggjar mánaðir úti – og tríggjar heima.

### Nýggj krøv

Hans Pauli í Horn sigur, at nýggj IMO-krøv, sum komu í gildi 1. januar í ár, hava gjørt tað neyðugt at selja skipið.

- Hesi krøv siga, at skrokkurin skal verða dupultur, um tú siglir við matolju, og tað var okkara ikki. Tí noyddust vit at selja skipið nú, sigur hann.

Hans Pauli sigur, at sáttmálin við nigerianararnar varð avtalaður fyri umleið einum mánaða síðan, og síðan komu undirskriftirnar endaliga upp á pláss fyri umleið 10 døgum síðan.

### Veit ikki

- Vit hava einki at bjóða manningini sum er, og ivasamt er, um vit keypa annað skip til henda flutning.

Hans Pauli í Horn sigur, at spurningurin um møguligt skipakeyp avhongur av, hvat er í útboði.

- Eg dugi einki at siga um hetta í løtuni, sigur hann.

Sum vit nevndu, hevur lítið verið at hoyrt um, at føroyingar hava átt eitt tangaskip, sum øll hesi árini hevur siglt við matolju.

- Tað er rætt, og vit hava heldur ikki gjørt so nógv burtur úr okkum, sigur Hans Pauli í Horni.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| Navn: | Tóra |
| Heimstaður: | Sandavágur |
| Smíðstaður/ár: | Nykøbing (1976) |
| Longd: | 68,20 metrar |
| Breidd: | 9,92 metrar |
| BRT: | 499,83 |
| Maskina: | B&W Alpha (770 HK) |
| Eigari: | Sp/f Tóra í Horni |
| Útgerðarmaður: | Tóra í Horni, Sandavág |

# Skurin seldur og manningin søgd úr starvi

**- Hetta er eitt lutfalsliga lítið og gamalt skip, og soleiðis er avgerðin at selja eisini ein liður í optimeringini hjá okkum, sigur stjórin í Faroe Ship, Jóhanna á Bergi**

SKIPASØLA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Teir átta menninir, ið sigla við farmaskipinum Skuranum, sum H.T. Shipping eigur, eru sagdir úr starvi sambært galdandi uppsagnartreytum.

Fýra menn eru við skipinum í senn og fýra eru í landi. Teir hava verið seks vikur umborð og seks heima.

Sum skilst, liggur uppsagnartíðin hjá monnunum um tríggjar mánaðir.

Avtala er gjørd um at selja skipið til ein franskan keypara, og væntandi fer skipið úr Føroyum seinastu ferð seinni í hesum mánaðinum.

### Optimering

Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sum eigur H.T. Shipping, sigur, at sølan er ein partur av ætlanunum hjá felagnum og soleiðis eisini ein liður í optimeringini hjá Faroe Ship.

- Hetta er eitt lutfalsliga lítið og gamalt skip. Vit hava nógv skip undir okkara veingjabreiði, og vit hava eisini Sirius eftir, sum framhaldandi fer at sigla við fóðuri fyri okkum.

Spurd, um manningin hevur fingið í boði onnur størv hjá Faroe Ship, sigur Jóhanna, at onkur av manningini hevur fingið tilboð um framhald.

